

*Frá vinstru eru tað Sølvi Reinert Hansen, Guttorm Sørensen og Evald við Garð, ið standa klárir áðrenn 800 metra teinin. Evald vann frammanfyri Guttorm, og Sølvi gjørdist nummar trý*

## FM 9. august 2003 á Svangaskarði

| Nr. | Tíð | Fornavn | Eftirnavn | Árgang | Felag |
|---|---|---|---|---|---|
| **100 m Menn / Vind: -0,7 m/s** | | | | | |
| 1 | 12,7 sek. | Evald | vid Garð | 1972 | Bragdið |
| **100 m Kvinnur / Vind: -0,7 m/s** | | | | | |
| 1 | 15,3 sek. | Guðrun | í Lágabø | 1977 | Bragdið |
| **400 m Menn** | | | | | |
| 1 | 60,3 sek. | Evald | vid Gard | 1972 | Bragdið |
| 2 | 60,8 sek. | Jonhard | Larsen | 1966 | Treysti |
| **800 m Menn** | | | | | |
| 1 | 2,18.0 min. | Evald | vid Gard | 1972 | Bragdið |
| 2 | 2,19.0 min. | Sølvi Reinert | Hansen | 1970 | Roysnið |
| 3 | 2,24.0 min. | Guttorm | Sørensen | 1968 | Treysti |
| **5000 m Menn** | | | | | |
| 1 | 16,42.4 min | Símun | Joensen | 1983 | Treysti |
| 2 | 16,52.6 min. | Jonhard | Larsen | 1966 | Treysti |
| 3 | 16,56.9 min. | Guttorm | Sørensen | 1968 | Treysti |
| 4 | 17,15.5 min. | Evald | vid Garð | 1972 | Bragdið |
| 5 | 17,43.7 min. | Sam | Vang | 1970 | Bragdið |
| 6 | 17,53.9 min. | Sigurð | Justinussen | 1967 | Bragdið |
| 7 | 19,44.6 min. | Óli | Olsen | 1949 | Bragdið |

## Onnur úrslit av Svangaskarði 9. august 2003

| Nr. | Tíð | Fornavn | Eftirnavn | Árgang | Felag |
|---|---|---|---|---|---|
| **100 m Dreingir -13 / Vind: -0,7 m/s** | | | | | |
| 1 | 12,7 sek. | Robin | Jønsson | 1990 | Roysnið(Bólkamet) |
| **400 m Dreingir -12** | | | | | |
| 1 | 79,5 sek. | Jan Elmar | Sørensen | 1991 | Treysti(Bólkamet) |
| **400 m Dreingir -13** | | | | | |
| 1 | 63,0 sek. Bólkamet | Robin | Jønsson | 1990 | Roysnið |
| **800 m Dreingir -12** | | | | | |
| 1 | 2,50.1 min. | Jan Elmar | Sørensen | 1991 | Treysti(Bólkamet) |
| **800 m Dreingir -13** | | | | | |
| 1 | 2,28,0 min. Bólkamet | Robin | Jønsson | 1990 | Roysnið |
| **5000 m Dreingir -12** | | | | | |
| 1 | 19,43.1 min. | Jan Elmar | Sørensen | 1991 | Treysti(Bólkamet) |

# FM í frælsum ítrótti

**Leygardagin 9. august skipaði FÍF fyri FM í frælsum ítrótti á Svangaskarði. Kappast varð í renning á ymsum teinum**

FRÆLSUR ÍTRÓTTUR
*Stefan í Skorini*

Kappingin var yvirhøvur merkt av, at sera fáir luttakarar høvdu meldað til. Bert 11 luttakarar vóru tilsamans. Av hesum var ein kvinna og tveir ungir dreingir, ið fingu loyvi at royna seg á ymsum teinum.

Fleiri orsøkir eru ivaleyst handan vánaligu luttøkuna. Fleiri tiltøk vóru hetta vikuskifti her heima, eins og onkrir av frægastu rennarunum luttóku í DM.

Samstundis er kappingarárið hjá rennarunum nú so langt (jan.-nov.), at neyðugt er at velja onkrar kappingar frá. Í ár hava nógv valt at satsa uppá Tórshavn Marathon, Oyggjaleikir og Grand Prix kappingina. Seinast í august byrjar heystkappingin, Daewoo Marathon Cup, og tí hava fleiri rennarar valt at hava frí frá kappingum í august.



*Evald við Garð gjørdist føroyameistari í 100, 400 og 800 metra renning*

### 5000 m

Størsta luttøkan leygardagin var í 5000 m. Sum væntandi var tað manningin úr Treystinum, Símun Joensen, Jonhard Larsen og Guttorm Sørensen, sum stýrdu kappingini.

Teir komu á mál í hesi somu røðini. Símun fekk tíðina 16.42,4 minuttir, Jonhard varð eini 10 sekund seinni, og Gutti varð síðani eini 4 sekund eftir Jonhard.

Teir arbeiddu væl saman í stórum pørtum av kappingini, soleiðis at einasta veruliga hóttanum móti teimum hendan dagin, Evald við Garð, ikki veruliga slapp uppí part.

Eftir hesum fýra komu Sam Vang og Sigurð Justinussen, og í seinasta bólkinum vóru Óli Olsen og bert 12 ára gamli Jan Elmar Sørensen, ið hóast hann var ov ungur til FM, hevði fingið loyvi at royna seg á teininum.

Ræumtuligur spenningur stóðst av kappingini millum Óla og Jan Elmar, ið hevði fingið tey ráðini at halda seg til Óla allan vegin. Tá teir fóru út á seinasta umgang, fór Jan Elmar framvið Óla og megnaði at koma á mál við sera góðu tíðini 19.43,1 minuttir.

### 100 m

Bert ein maður og ein kvinna høvdu melda til renning á 100 m: Evald við Garð, ið rann 800 m fyri Føroyar á Oyggjaleikunum í summar, og Guðrun í Lágabø. Afturat teimum luttók eisini ein av okkara ungu evnaríku rennarum, 13-ára gamli Robin Jønsson úr Roysninum.

Tá avtornaði, gjørdist sera tætt millum Evald og Robin. Teir fingu somu tíð, 12,7 sekund, men Robin varð fyrstur um strikuna.

Eftirsum hann var ov ungur til FM, gjørdist Evald føroyameistari, men Robin setti nýtt bólkamet á hesum teininum. Guðrun í Lágabø fekk tíðina 15,3 sekund.

### 800 m

Síðani varð kappast á 800 m. Evald við Garð var sjálvskrivaður til hesa kapping, hóast hann var vorðin nakað móður av luttøkuni í fyrst 5000 m og síðani 100 m.

Móti honum kappaðust Guttorm Sørensen og Sølvi R. Hansen. Eisini royndu teir báðir unglingarnir, Robin Jønsson og Jan Elmar Sørensen, seg á hesum teininum.

Kappingin gjørdist tætt millum Evald og Sølva. Eftir eina javna byrjan tók Sølvi leiðsluna eftir 100 m og helt hana, til einir 500 m vóru runnir. Tá fór Evald framvið, og hann helt leiðsluna heilt á mál. Evald vann við tíðini 2.18,0 minuttir, eitt sekund frammanfyri Sølva, ið varð 5 sekund frammanfyri Gutta.

Robin Jønsson og Jan Elmar Sørensen settu báðir nýtt bólkamet á teininum.

### 400 m

At enda varð kappast á 400 metrum. Enn einaferð skuldi Evald royna seg. Hesuferð móti Jonhard Larsen og Robin Jønsson. Teir vóru allir nakað troyttir frá hinum kappingunum.

Evald við Garð vann við 60,3 sekundum. Jonhard Larsen hevði 60,8 sekund og Robin Jønsson setti nýtt bólkamet við 63,0 sekundum.

### Frælsi ítrótturin ringar umstøður

Samanumtikið fingu fáu luttakararnir í FM hesaferð eina góða kapping. Vindurin var lítil, og veðrið gott. Unglingarnir fingu eisini sett nøkur nýggj bólkamet.

Kappingarnevndin hjá FÍF fer í vetur at umrøða støðuna hjá FM í kappingarskránni.

Tað er tó eyðsæð, at núverandi støðan, at bert eitt øki er til frælsan ítrótt í landinum, ikki eggjar fólki til at luttaka í kappingum á slíkum økjum.

Hinvegin er áhugin stórur og alsamt vaksandi fyri kappingum á vegnum. Hesar verða hildnar kring alt landið. Í fyrstu atløgu hevði tað verið ynskiligt við økjum til frælsan ítrótt í Havn og í Klaksvík, har Bragdið og Treysti halda til.

Øki til frælsan ítrótt eru ein fortreyt fyri, at feløgini kunnu veita børnunum og teimum ungu tað venjing og tað umhvørvi, ið tey ynskja og hava tørv á.

Annars metir FÍF, at bygdir kring alt landið áttu at havt frælsa ítróttin í huga, tá vallir vórðu bygdir ella umvaldir.

Umframt at geva øllum aldursbólkum atgongd til tryggar venjingarumstøður, kunnu øki til frælsan ítrótt eggja fólki til at røra seg meiri, uttan mun til, um endamálið er kapping ella motión.



*Yngstu luttakararnir vóru Jan Elmar Sørensen úr Treystinum (vinstrumegin), sum rann 5000 metrar, og Robin Jónsson av Toftum, sum vann 100 metra kappingina*





*Treysti vann øll heiðursmerkini í 5000 metra renning. Jonhard Olsen, Símun Joensen og Guttorm Sørensen*






# Metstórt tap í Hollandi

**Kropsliga styrkin var stóri munurin, tá ið KÍ mikukvøldið legði rygg til størri tap, enn tær nakrantíð áður hava gjørt í Europa Cup**

EUROPA CUP KVINNUR
*Jóannes Hansen*

Hóast tær stríddust tað, sum tær vóru mentar, so beyð ikki bøtur. KÍ kvinnurnar fingu rættuliga oyruni í maskinuna, tá ið tær týskvøldið vóru í fyrstu royndini í Europa Cup umfarinum, sum í hesi vikuni er á skránni í hollendska býnum Sessenheim.

Mótstøðuliðið í fyrsta dystinum var eingilska meistaraliðið Fullham, ið verður styrkismett millum tey tíggju bestu í heiminum. Hjá Fullham var eingin slingur í valsinum. Tær tóku uppgávuna ímóti KÍ í fullum álvara, og tær vunnu 8-0, eftir at tað í steðginum hevði verið 4-0.

KÍ hevði ein møguleika at gera mál, men bólturin streyk framvið málinum.

– Vit mugu bara ásanna, at tað fyrst og fremst var í kropsligu styrkini, at munurin var so ógvuliga stórur, staðfestir Jón Harald Poulsen, KÍ venjarin, úr Hollandi. Tá ið mótstøðan brádliga er av hesum kalibrinum sást tað týðuliga, at KÍ kvinnurnar ikki plaga at fáa nakra serliga mótstøðu í heimligu kappingunum.

Í landskappingini og steypakappingini heima á landi fær KÍ liðið so lítla mótstøðu, at flestu dystirnir enda við tvísifraðum tølum.

8-0 tapið ímóti eingilska meistaraliðnum er tað størsta, sum KÍ hevur lagt rygg til í stuttu Europa Cup søguni hjá føroyskum kvinnufótbólti. Søgan gongur bara tvey ár aftur í tíðina, og KÍ er einasta liðið, sum hevur umboðað Føroyar.

Í kvøld skal KÍ spæla ímóti hollendska meistaraliðnum Leede. Leygardagin verður moldoviska meistaraliðið FC Codru á skránni. Alt bendir á, at tað verður í síðstu royndini, at KÍ fer at hava møguleikan at vinna. Mikukvøldið vann Leede stórt á FC Codru.

Í teimum seks dystunum, sum KÍ tey bæði undanfarnu árini hevur spælt í Europa Cup, hava tær tapt fýra og vunnið tveir. Størsta tapið undan ferðini til Hollands var í Umeå í Svøríki fyri einum ári síðani. Tá vann heimaliðið, sum seinni gjørdist Europa Cup vinnari, 7-0 á KÍ. Í fjør tapti KÍ 4-0 ímóti Sparta Prag, og í 2001 tapti KÍ tvær ferðir 4-0 – ímóti HJK Helsinki, sum hevði heimavøll, og ímóti italska meistaraliðnum Torres. Leygardagin fer KÍ at stríðast fyri at vinna triðja Europa Cup sigurin. Í fjør vunnu tær 2-0 á Tallinn úr Estlandi, og í fyrraárið vunnu tær 2-1 ímóti Landhaus úr Eysturríki.